# Skattalættar kunnu merkja skerjingar

*Vit vilja fegin síggja tann ráðharra, sum hevur dirvi at geva skattalættar, tá búskapurin er í minking, og almennu kassarnir tømast, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi*

ÓLAVUR Í BEITI

– Í seinastuni hava aðrir spurningar viðv. skattlóggávu verið umrøddir á tingi. Samgonguskjalið, ið verandi samgonga byggir á, staðfestir, at skattalættar skulu fremjast. Nakrir samgongutingmenn fýlast á, at einki røkist fyri at nakað hendir á hesum øki, meðan fíggjarmálaráðharrin heldur, at ov nógv ferð er á búskapinum til, at skattalættar kunnu fremjast, stendur m. a. í nýggjasta tíðindaskrivinum frá Vinnuhúsinum.

Og víðari verður sagt, at gaman í er ferð á búskapinum, men tað eigur ikki at vera nakar trupulleiki. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ilt við at fáa eyga á, nær skattalættar skulu fremjast, um tað ikki verður í góðum tíðum.

– Vit vilja fegin síggja tann ráðharra, sum hevur dirvi at geva skattalættar, tá búskapurin er í minking, og almennu kassarnir tømast. Í einari slíkari støðu kunnu skattalættar jú merkja skerjingar, eisini av størvum — og ásannast má, slíkt er óhugsandi í Føroyum.

– Eftir okkara tykki, er lagaliga løtan til minking av skattatrýstinum júst tá ið hetta kann gerast, uttan at almennu kassarnir líða undir tí.

– Vit skilja fullvæl, at tað kann hava avleiðingar at seta uppaftur meira ferð á búskapin, við at geva skattalættar. Men tað finnast aðrir møguleikar at regulera búskaparhitan enn skattatrýst. Um búskapurin skal tálmast, snýr tað seg um at minka um almennu ella privatu nýtsluna. Og heldur enn bara at hugsa um privatu nýtsluna, eiga myndugleikar okkara í nógv størri mun, at seta almennu nýtslunu undir sjóneyku.

– Vit sakna eina miðvísa og regluliga gjøgnumgongd av øllum virksemi undir landinum, við tillaðing av almenna sektorinum fyri eiga, soleiðis at borgarin fær veruligt virði fyri hvørja skattakrónu.

– Eisini er møguligt at lækka skattatrýstið og samstundis skapa karmar í fremja áhugan hjá borgaranum í egnari uppsparing, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Vinnuhúsinum.

## VALUTAKURSIR

| | | 14.02.00 | Ultimo januar |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 752,2900 | 758,8200 |
| Bretland | Pund | 1196,8200 | 1231,5900 |
| Týskland | Markur | 380,6800 | 380,5300 |
| Svøríki | Króna | 87,7000 | 86,5000 |
| Noreg | Króna | 92,0800 | 92,0000 |
| Frakland | Frankur | 113,5000 | 113,4600 |
| Belgia | Frankur | 18,4570 | 18,4490 |
| Sveits | Frankur | 463,7400 | 462,3200 |
| Holland | Gyllin | 337,8600 | 337,7300 |
| Italia | Liri | 0,3845 | 0,3844 |
| Finnland | Markur | 125,2200 | 125,1700 |
| Ísland | Króna | 10,3000 | 10,3000 |
| Eysturríki | Skillingur | 54,1080 | 54,0870 |
| Spania | Pesetas | 4,4750 | 4,4730 |
| Portugal | Escudos | 3,7140 | 3,7120 |
| Kanada | Dollari | 518,1200 | 525,3000 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,2360 | 2,2420 |
| Japan | Yen | 6,9531 | 7,1009 |
| Írland | Pund | 945,3700 | 945,0000 |
| | Evra | 744,5400 | 744,2500 |

FØROYA SPARIKASSI



*— Tað er sum um at øll vilja eiga hann, og summi hava tað soleiðis, at ongantíð betri um tey halda seg hava einkarætt til hansara, segði Ólavu Rasmussen, hvalbiarprestur, m. a. í prædikuni í Hvalbiar kirkju sunnudagin*

# Ólavur innsettur sum prestur í Hvalba

*Sunnudagin setti Bjarni Bæk, dómpróstur, Ólav Rasmussen í starvi sum sóknarprestur í Hvalbiar Sókn, sum hevur ligið í prestaloys síðani á heysti í fjør, tá Andreas Andreassen segði seg úr starvi. Vit prenta innsetingarprædiku Ólavs:*

*Ljósanna faðir,*
*hjá tær er skiftandi skuggi,*
*í tínum ljósi er birtur ein*
*ljósanna gluggi,*
*frelsisljós hátt,*
*lýsir um aldanna nátt,*
*okkum er lívssælur uggi.*

(Alveldis drottur, 26)

Tað er ikki neyðugt at fara út um landoddarnar fyri at síggja hvussu ósamd fólk eru um leiklutin hjá kristindóminum upp gjøgnum tíðirnar. Henda ósemjan byrjaði longu á Jesu døgum. Nógvir bólkar, ella sektir, stungu seg upp og hvør sekt royndi at krøkja Jesus uppá sín krók, og soleiðis taka patent uppá sannleikan. Onkur segði Jesus vera ein politiskan terrorist, sum vildi stovna tað fullkomna ríki á jørð. Onkur segði Jesus vera ein harðrendan dómara, sum ikki vildi lata lívið í annað enn paragraffir og reglugerðir. Og tað vóru eisini tey, sum søgdu Jesus vera ein guðsspottara, ein ørvitisfisk, sum villeiddi fólkið.

Og í dag er støðan akkurát tann sama. Fólk klandrast framvegis um, hvør hann er. Tað er sum um at øll vilja eiga hann, og summi hava tað soleiðis, at ongantíð betri um tey halda seg hava einkarætt til hansara. So, hóast tað eru 2000 ár síðani, at hann gekk her og stríddist, so hava vit framvegis øll eina meining um henda mannin, sum meira er skrivað um, enn nakran annan í heimssøguni. Eisini tá vit skriva um slíkt, sum onki hevur við kristindómin at gera. Sjálvt tá vit skriva undir eina kvittan á posthúsinum spøkir Jesus aftur, tí at tíðarrokningin, dagfestingin, er sett eftir føðing hansara.

Hvussu ber tað til, at Jesus er so torførur at seta í bás? Svarið er í roynd og veru rættuliga einfalt. **Tað er tí at hann ikki setur nakran av okkum í bás.** Tað var hetta sum fekk sinnið í kók hjá farisearunum, høvuðsprestunum og øðrum stórum monnum, sum ikki toldu, at Jesus setti lívið hægri enn lógina. Og ikki bara tað, hann pástóð eisini, at í Harrans húsi eru mangir bústaðir, nevniliga ein bústaður til hvønn einstakan av okkum. Tað var ikki uttan grund at hann var krossfestur, tí at hann pilkaði við sjálvan mergin í einum samfelag, sum var borið uppi av sjálvrættvísi og fordøming av medmenniskjanum. Og vit kunnu vera vís í, at hevði hann gingið her á jørð í dag, so høvdu tey sjálvrættvísu, embætismenn og aðrir mappufrensar, eisini her í Føroyum, annaðhvørt syrgt fyri at hann kom í fongsul ella var innlagdur á lukkaða avdeiling. Matteus sigur, at uppi á fjallinum umbroyttist Jesus fyri eygunum á vinum hansara. Hugsa vit um kristindómin í heimssøguligum ljósi, so haldi eg tað er rættari at siga, at tað vóru vinir hansara, sum broyttust. Hjartatátturin í søguni í dag er, at vinirnir komu omanaftur av fjallinum sum nýggir menn. Nú kenna vit føroyingar væl til fjøll. Vit kunnu bara hugsa um Grímsfjall her í Hvalba. Vit síggja fyri okkum hesar menninir koma oman av fjallinum. Ikki sum fjallmenn, har alt er a rókanum eins og í grind. Men teir koma oman í bygdina við avkláraum eygum, nýggjum tankum og kenslum, tí at teir hava fingið at vita, beint ímóti lógini, at teir eru Guðs børn, hóast teir ikki hava fín størv og ikki eru viðurkendir av høvuðsprestum og øðrum høgum harrum. Men tað vóru ikki bara teir, sum broyttust. Øll bygdin broyttist. Og soleiðis hevur tað verið líka síðani, eisini her í Hvalba.

Tað kann mangan vera kalt og harðbali uppi á Grímsfjalli. Hugsið bara um náttina, sum fór. Tað kann eisini vera kalt niðri í bygdini. Tá ið sorgin leggur sína døpru hond yvir mannahjørtuni, og øll bygdin søkkur saman í angist og samkenslu. Men síðani Jesuspápi tók bygdina í sína verju, hava bygdarbørnini, vaksin sum smá, kent fløðan av, at vit øll eru Guðs børn, ongin er settur uttanfyri, og ongin hevur rætt til at seta nakran uttanfyri. Hetta er gull vert tá á stendur, og stormarnir leika, ikki bara á Grímsfjalli, men inni í okkum sjálvum.

Besta dømi um hetta er, at bygdarfólkið í Føroyum, frá araldstíð, hevur kallað Kristus fyri Jesuspápa. Hetta er, mær vitandi, ein dømi í allari verðini. Umbroytingin á fjallinum er júst tann, at menninir lærdu Kristus at kenna sum Jesuspápa. Jesuspápi er tann, sum onki leggur í paragraffir, og sum tú kanst hava við tær allastaðni, uttan at tað er neyðugt at rópa hart um tað. Hann fylgir tær ígjøgnum alt lívið - eisini tá ið tú rørt tann seinasta teinin.

- Amen -



*Í hesi løtu gertst Ólavur Rasmussen aftur prestur*
**Mynd: Áki Bertholdsen**



e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttarSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Neistin er við í gullstríðnum

Við sigrinum á VÍF leygardagin togaði Neistin seg upp á næst ovasta sessin á stigatalvuni, har teir nú eru ájavnir vestmenningum og strandingum við 19 stigum



Fyri fyrstu ferð í ár eydnaðist tað Áka Olsen at koppa stórabeiggjanum og fyrrverandi liðfeløgum sínum úr Vestmanna, hóast tað eftir myndini at døma var Ingi, sum megnaði at koppa Áka og Neistanum

Mynd: Álvur Haraldsen

JÁKUP MØRK

**Neistin-VÍF 23-22 (12-12)**

Hóast lagnudystur kanska er eitt í so sterkt orð, so var eingin í iva um, at dysturin móti VÍF leygardagin hevði stóran týdning fyri Neistan.

Eftir tapið í steypafinaluni móti Kyndli, hevur Neistin nú bert FM-heitið at hugsa um, og ein sigur móti VÍF vildi viðføra, at toppurin gjørdist púrasta javnur.

Eitt tap vildi hinvegin sett teir nógv aftur í gulldystinum, eins og hetta vildi givið VÍF eitt glopp á tvey stig niður til strandingar.

Sostatt var av sonnum lagt upp til ein spennandi dyst, og hóast onkur helt, at ein slíkur dystur átti at verið leiktur sunnudag, so vóru heilt nógvir áskoðarar, sum høvdu funnið sær leiðina niðan í Ítróttarhøllina,, tá dysturin varð settur í gongd.

## VÍF byrjaði betri

Í nógvum av undanfarnu dystunum, hevur Neistin byrjað sum eitt óløgi, og harvið skapt sær eina hampuliga leiðslu tíðliga í dystinum. Hesu ferð gekk tað tó júst øvugt, tí leygardagin vóru vestmenningarnir nógv fyrir úr startblokkunum enn heimaliðið.

Ingi og Sámal gjørdu snøgt sagt sum teimum lysti, og tá fyrri hávleikur var gott og væl hálvrunnin, sá ikki mætari út enn at VÍF ætlaði at trumla alla mótstøðu til viks.

Venjarin hjá VÍF, Hjalmar Klein Olsen, valdi ikki at mansverja bæði Heina Joensen og Áka Olsen, men royndi í staðin við skiftandi mansverju, har eittarin í verjuni reikaði heilt úti hjá øðrum teirra.

Neistin kom tó so líðandi inn aftur í dystin. Sámal varð tikin úr spælinum, og hóast ingi framhaldandi royndi at gera um seg, so tók mansverjan nógv av broddinum úr vestmannaálopunum.

Seinastu 10 minuttirnar av hálvleikinum, tók Neistin so rættuliga dik á seg, og í seinasta minuttinum kundi Áki Olsen skjóta heimaliðið upp á javnleik fyri fyrstu ferð í dystinum.

At VÍF leikararnir ikki megnaðu at halda fast um leiðsluna teir høvdu, munnu teir helst iðra seg um í dag. Vóru teir eitt sindur hepnari og meira avgjørdir, áttu teir uttan iva at kunna gjørt av við neistaliðið í fyrra hálvleiki. Ístaðin framdu teir ta deyðssynd, at teir rættu mótstøðumonnunum lítla fingurin, og so tók Neistin av.

## Gekk javnt á

Allan seinna hálvleik leikaði sera javnt á millum liðini bæði. Neistin hevði fyrsta partin av hálvleikinum hug at hava leiðsluna, men hvørja ferð teir sníktu seg fram um, megnaðu vestmenningarnir at svara aftur, og munurin gjørdist ongantíð meira enn tað eina málið.

Miðskeiðis í hálvleikinum megnaðu vestmenningar brádliga at leggja seg fram um, men framhaldandi varð munurin hildin niðri á einum máli. Eftir at vestmenningar so í eina tíð royndu at slíta seg leysar, eydnaðist tað enn einaferð heimaliðnum at koma fram um, og nú riggaði brádliga eitt sindur betri.

Seinastu minuttirnar gjørdi Páll brádliga av, at bæði Sámal og Ingi skuldu mansverjast, og hetta tíðarbili eydnaðist tað neistanum at leggja seg tvey mál fram um, og bert ein knappur minuttur var eftir at leika.

VÍF leikararnir góvust tó kortini ikki á hondum. Teir skundaðu sær niðan móti neistamálinum, og megnaðu eisini at skorað tað, sum skuldi vísa seg at gerast seinasta málið í dystinum.

Heimaliðið var tó nær við at missa sigurin á gólvið, tí í seinasta álopinum, har teir bert skuldu fáa seinastu 30 sekundini at ganga, megnaðu teir onkursvegna at missa bóltin burtur, og so kundu vestmenningarnir fara í eina seinastu álopsroynd. Henda endaði við, at Harald Bjørgvin royndi seg frá veinginum, men royndin miseydnaðist.

Fleiri av vestmenningunum vildu hava dómararnar at bríksla fyri brotskasti, men floytan tagdi, og neistaleikararnir kundu fegnast um tvey týdningarmikil stig. Nú skal eg ikki taka dagar ímillum, um seinasta royndin átti at givið brotskast, men eftir mínum tykki hevði møguleikin fyri hesum verið nógv størri, um Harald ikki gjørdi so nógv av, tá hann lat seg detta. Royndin eftir brotskastinum var somikið týðulig, at dómararnir í veruleikanum ikki høvdu annað val enn at tiga.

## Ikki bert Áki og Heini

Einki er at taka seg aftur í, at teir báðir stórskjúttarnir, Heini og Áki, eiga stóran lut í, at kappingarárið higartil hevur hylnast somikið væl hjá Neistanum.

Eftir steypaósigurin móti Kyndli seinasta vikuskifti vóru tað helst eisini fleiri, sum vildu vera við, at liðið uttan teir báðar ikki formáddi sær nakað sum helst. Hetta var helst eisini rætt í finaludystinum, men leygardagin var sjón fyri søgn, so galið er tað kortini ikki.

Ein leikari, sum rættuliga gjørdi um seg leygardagin, var Áki Mørk, sum er ein teirra, sum hevur verið í Neistanum øll hondbóltsárini. At hondbóltsevnini eru góð, er lítið at ivast í, men oftani hevur úrtøkan verið heldur soltin kortini. Leygardagin hevði hann tó ein av sínum heilt góðu døgum, og fleiri av málum hansara komu í sera týdningarmiklum løtum.

Eisini átti málverjin, Petur Magnusson, stóran heiður fyri sigurin leygardagin. Tað var annars Bogi Henriksen, sum byrjaði í neistamálinum, men tíðliga í dystinum varð hann skotin í andlitið, og so kom Petur á vøllin. Beinan vegin framdi hann fleiri bjargingar, og tað sum eftir var dystinum, syrgdi hann alla tíðina fyri, at VÍF ongantíð skuldi sleppa frá heimaliðnum.

VÍF hevur nú tapt tveir dystir í endaspælinum, men framhaldandi eru teir tó á odda, takkað verið góða málmuninum.

Teir hava tó leikt ein dyst meira enn bæði Neistin og StÍF, sum bresta saman inni á Skála komandi sunnudag. Higartil hevur Neistin fingið fulla úrtøku í endaspælinum, og megna teir at vinna sær bæði stigini komandi sunnudag fer tað at síggja heilt gott út hjá eldra høvuðsstaðarfelagnum, sum rættuliga er farið at gullmerki fyri fyrstu ferð síðani 1978.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Neistin: Heini Joensen 7 (3), Áki Mørk 5, Áki Olsen 4, Kári Mortesen 2, Karl O. Rasmussen 2, Finnur Hansson 2, Ræni Slættanes 1
VÍF: Ingi Olsen 7, Sámal Joensen 5, Harald Bjørgvin 2, Agnar Joensen 2, Johnny Joensen 2, Martin Hummeland 2, Ragnar Zachariasen 1, Petur Fr. Joensen 1
**Brotskøst:**
Neistin 4
**Útvísingar:**
Neistin 1, VÍF 5
**Dómarar úr Kyndli:**
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen